Dimmalætting

NR. 63 • Hósdagur 27. apríl 1995 • 118. árgangur • Tlf. 11212 • Fax. 10941

7 kr.

Niels Helveg Petersen, uttanríkisráðharri:

– Vit berjast fyri tykkum í ES

– Alt ES stendur fyri stórum broytingum í komandi tíðum, sum stjórnir limalanda skulu taka støðu til á ráðstevnu komandi ár – ikki minst viðvíkjandi støðutakanini til upptøku av fleiri limalondum, men avgerðin, hvørt føroyingar vilja fara uppí, verður tykkara egna. Í Danmark verður eingin roynd gjørd at trýsta tykkum. Vit fara hinvegin at berjast fyri at vinna tykkum mest møgulig rættindi, sigur Niels Helveg Petersen, uttanríkisráðarri, sum hevur verið á vitjan í Føroyum í tveir dagar

PÓL Á KLETTI

Niels Helveg Petersen, uttanríkisráðharri, fór aftur til Danmarkar við fylgi sínum í gjár. Vitjan hansara í Føroyum var ein arbeiðsvitjan, har serstakliga handilsviðurskifti okkara við ES vóru umrødd.

Uttanríkisráðharrin gjørdi greitt, at danska stjórnin altíð er sinnað at stuðla føroyingum at fáa betri handilsviðurskifti í lag við ES, men tað vera føroyingar sjálvir, sum gera av á hvønn hátt hesi viðurskifti skulu skipast.

Umframt landsstýrið hevur uttanríkisráðharrin á vitjan síni í Føroyum eisini hitt umboð fyri vinnulívið – Føroya Fiskavirking og Fiskasøluna – og marknaðarnevnd løgtingsins.

Tað er serliga triðjalandsvørur, fiskiídnaðurin er sinnaður at fáa lagaligari útflutningstreytir fyri. Herfyri var tollurin tikin av so at siga øllum paneraðum fiskavørum til ES, men hvat viðvíkur triðjalandsvørum, gjørdi uttanríkisráðharrin greitt, at her verður ikki talan um nakra tolllækking, tí hetta er ein so viðbrekin spurningur, at hann tekur alt grundarlagið undan ásetta ES-politikkinum um ávísir partar fáa eftirlæti.

Niels Helveg Petersen sigur seg hava fingið gott innlit í føroysk viðurskifti, hesar dagarnar, hann hevur vitjað. Sigur, at hann frammundan ikki hevði væntað, at føroyingar fóru at biðja um nærri tilknýti til ES, men hinvegin, at hann hevur fingið fatan av, at bæði politikarar og vinnulívsmenn ikki eru nøgdir við verandi støðu.

– Danska stjórnin fer at gera alt, sum stendur í hennara makt at bøta um handilsviðurskifti føroyinga við ES. Og har verður neyðugt at taka eitt ódnartak, tí fiskivinna og útflutningur av fiskavørum er eitt sera viðbrekið mál í ES. Talan er sum kunnugt ikki bara um at sannføra donsku stjórnina og danskar politikarar, men um at fáa eina felags europeiska semju. Og sjálvt um føroyingar ikki eru fyri ES-limaskapi, so hevur danska stjórnin skyldu at berjast fyri føroyskum áhugamálum í ES og at fáa best møgulig úrslit, sigur Niels Helveg Petersen.

Á fundum við landsstýrið og marknaðarnevndina varð ført fram, at tá øki sum Ermarsundsoyggjarnar, Man og Grønland, ið ikki eru limir í ES, hava tollfrælsi, so áttu Føroyar at fingið somu sømdir.

Men Niels Helveg Petersen helt spurningin ikki vera so eyðsvaraðan. Viðvíkjandi Ermarsundsoyggjunum og Man upplýsti hann, at hesi øki ikki flyta út viðkvæmar vørur sum fisk, og tá ein fiskivinnutjóð sum Grønland hevur tollfrælsi skyldast tað, at grønlendingar afturfyri tollfrælsi lata ES kvotur. At so ES ikki fær tann fiskin, tað vil, er ein vági, ið tað má binda á seg og ikki grønlendingar.

Mynd: Diml/Jens Kristian

Niels Helveg Petersen: - Danska stjórnin fer at gera alt, sum stendur í hennara makt at bøta um handilsviðurskifti føroyinga við ES. Og har verður neyðugt at taka eitt ódnartak, tí fiskivinna og útflutningur av fiskavørum er eitt sera viðbrekið mál í ES. Talan er sum kunnugt ikki bara um at sannføra donsku stjórnina og danskar politikarar, men um at fáa eina felags europeiska semju. Og sjálvt um føroyingar ikki eru fyri ES-limaskapi, so hevur danska stjórnin skyldu at berjast fyri føroyskum áhugamálum í ES og at fáa best møgulig úrslit

Okkurt er ravruskandi galið í landinum

Fundurin, sum kvinnur skipaðu fyri í Sjónleikarhúsinum í Havn flaggdagskvøld, varði í samfullar tríggjar tímar. Nógvir áhugaverdir spurningar komu fram og óteljandi uppskot, ið høvdu við samfelagsligu viðurskifti okkara í dag at gera.

BEATE L. JENSEN

Tað var eitt sera væleydnað kvøld, ið kvinnurnar skipaði fyri í Sjónleikarhúsinum í Havn flaggsdagskvøldið.

Stig til tiltakið høvdu nakrar av teimum kvinnum, sum vóru við á kvinnuráðstevnuni í Finlandi í fjør, tikið, og var kvøldið skipað so fyri, at fýra kvinnur við eitt pallborð komu fram við hvør sínum uppleggi til samfelagsligt kjak, sum áhoyrararnir síðani kunnu koma við viðmerkingum til ella nýggjum uppskotum um fyri at betra um støðuna í samfelagnum í Føroyum í dag.

Við pallborðið sótu Elin Dahl Johannesen, Súsanna Dam, Ingrid Jacobsen og Gulla Øregaard. Til orðstýrara var Hanna Joensen biðin.

Hanna Joensen var somuleiðis biðin um at halda eina flaggdagsrøðu, og tað gjørdi hon.

Sosialir spurningar

Á fundinum kom fram, at tað eru teir sosialu trupulleikarnir, sum í dag raka okkum meinast. Í hesum trupulleikum eru tengdir spurningarnir viðvíkjandi teimum arbeiðsleysu og prísurin á neyðsynjarvørum.

– Tað vóru slík evni, ið høvdu størsta áhugan millum fundarfólkið, sigur Hanna Joensen, orðstýrari, við *Dimmalætting*.

Uppskot komu fram, hvussu trupulleikarnir kundu loysast, m.a. við at meirvirðisgjaldið var tikið burtur á neyðsynjarvørum. Onkur annar helt, at tað mátti bera til at kroysta myndugleikarnar til fáa ein farloyvisskipan ígjøgnum við ALS-skipanina.

Um at yvirliva

Sjálvsagt komu eisini nógv onnur uppskot fram.

Um tey kunnu brúkast ella ikki, er ikki tað týdningarmesta í hesum kjaki. Heldur vísir eitt tílíkt kjak um samfelagsligar spurningar, at nakað er ravruskandi galið í Føroyum í dag.

Nógv varð tosað um, hvat gerast kann við tey, sum missa hús síni, tí aftur nú verður lýst við óteljandi húsatvingsilssølum, sigur Hanna Joensen.

– Hvat kunnu vit gera við hesi fólk?, spyr hon.

Á fundinum kom fram, at peningastovnarnir hava verið sera tvørir at gera hóskandi avtalur við fólk, avtalur, sum tey kunnu halda, sigur Hanna Joensen.

Í sambandi við hetta kemur hon við einum dømi um, at tey vóru ikki heilt fá, sum fyri fáum árum síðani høvdu eina mánaðarinntøku uppá einar kr. 20.000,-, men í dag er henda inntøka ikki meiri enn kanska kr. 5.000,- um mánaðin. Hvat kann ein familja tá gera fyri at yvirliva?

Tosaðu frá hjartanum

Í Føroyum hava vit ikki somu sosialu hjálparveitingar, sum tey hava í hinum Norðurlondum. Vit hava ongar sosialar íbúðir at leiga fólki.

– Tað var ógvuliga hugaligt at vera orðstýrari á fundinum Sjónleikarhúsinum hetta kvøldið, sigur Hanna Joensen, tí fundarfólkini vóru røsk at taka orðið. Ein orsøkin kann vera, at har var hvørki útvarp ella sjónvarp, sum tók upp, so eingin hevði nakað at óttast fyri. Tey kundu siga alt og tosa líka út frá hjartanum um veruliga um spurningar, sum píndu bæði tey og samfelagið sum heild.

Fundurin varði í samfullar tríggjar tímar. Tá mátti fundurin slítast, hóast hann væl kundi vart munandi longur, tí fólk vóru vorðin troytt hóast alt.

Tveir arbeiðsbólkar

Eftir fundin var høvi hjá áhugaðum at steðga eina løtu og møguliga vera við til at skipa seg í smærri áhugabólkar. Úrslitið av hesum var, at tveir arbeiðsbólkar vóru settir, har luttakararnir ætla at halda fram við at taka upp samfelagsligar spurningar og kanna eftir, hvussu gjørt hevur verið og verður aðra staðni í londunum uttanum okkum fyri at fáa hesar loystar.

- Tað er heilt greitt, at fundarfólkið var fegið um stigtakanina til henda áhugaverda og gevandi fundin fyri kvinnur, og at hann átti at verði tikin uppaftur eina aðru ferð, sigur Hanna Joensen.

Kvinnur skipaðu fyri fundi í Sjónleikarhúsinum flaggdagskvøldið, har kjak var um evni av samfelagsligum týdningi. Orðstýrari var Hanna Joensen. Við pallborðið sótu Elin D. Johannesen, Súsanna Dam, Ingrid Jacobsen og Gulla Øregaard.

Mynd: Diml/Jens Kristian

Hógv og handalag í undirgrundarmálinum

Á tíðindafundi í landsstýrinum var Niels Helveg Petersen, uttanríkisráðharri, spurdur, hvørjar vánir hann hevði fyri einum úrsliti av marknasamráðingunum millum danir og føroyingar øðrumegin og bretar hinumegin.

Eitt nýtt umfar í samráðingunum byrjaði í gjár. Niels Helveg Petersen metti ikki, at nakað endaligt úrslit fer at spyrjast í hesum umfari, men segði tað vera týdningarmikið, at framstig vera gjørd nú nakað skjótt.

– Danska stjórnin fer at mæla bretsku myndugleikunum til at sýna hógv og gott handalag, tí tað hevur skund at fáa eina loysn á hesum málinum nú nakað skjótt, segði hann.

Hann gjørdi eisini greitt, at samráðingarnevndirnar hjá báðum pørtum eru sinnaðar at halda seg til avtalaðu mannagongdina í samráðingunum.

Í BLAÐNUM Í DAG

Fleiri fylkjast um merkið

Týsdagin var flaggdagur. Sum vanligt skipa skótarnir fyri ymsastaðni kring landið við skrúðgongu, tónleiki og røðum. Í Havn helt Magni Arge flaggrøðuna. Nú politisk stik eru flutt til frama fyri breiðari samstarvi og útlit eru fyri oljuvinnu, helt hann orsøk vera at halda, at fleiri fylkjast um merkið.

Jacques Chirac verður forseti

Borgarliga valevnið Jacques Chirac fer at vinna annað umfar av franska forsetavalinum, sum verður 7. mai. Nýggjasta meiningakanningin vísir, at Chirac fær 55 prosent av atkvøðunum. Men veljarakanningar eru sum kunnugt ikki altíð eftirfarandi.

Føroyingar spæla fótbólt í Ålborg

Bóltfelagið Fintan – fótbóltsfelagið hjá Føroyingafelagnum í Ålborg – skal í ár luttaka í tí donsku kappingini undir Jydsk Boldspil Union. Fintan hevur í nøkur ár luttikið í virkiskappingum í Ålborg.

Ikki fleiri Rushdie-kanningar

Norska løgverjan endar nú leitingina eftir tí yvirgangskroppi, sum loysti skot av ímóti og særdi stjóran í norska forlagnum Aschehoug, sum hevur givið út norsku týðingina av bók Rushdies »Satans ørindi«. Iranskir yvirgangsmenn eru mistonktir.

Stórur »poppari«

»Eg eri nú sjálv farin undir at skriva bæði lag og tekst til mínar sangir. Tað hongur betur saman, og er tiskil eisini lættari at syngja«, sigur Maria Guttesen, sum í næstum kemur til Føroya at hava konsert í Norðurlandahúsinum.



Sjúkrakassin meira brúkaravinarligur

»Vit vildu ynskt, at tann bólkur, sum nú er settur at bøta um sjúkrakassaskipanina, varð settur fyri fleiri árum síðan, m.a. tí at undanfarin ár hevur nærum einki samskifti verið millum sjúkrakassan og hinar stovnarnar«, sigur Tórbjørn Mikkelsen, formaður í Havnar Sjúkrakassa.

- Herfyri steðgaðu samráðingarnar millum umboð fyri Norðurkorea og Amerika um kjarnorkuspurningin, men nú hava partarnar tikið uppaftur samráðingarnar av nýggjum.
- Í Iran hevur regnað av grimd seinastu dagarnar. Vatnflóð nærhendis heilaga býi landsins, Mashhdad, hevur kostað 10 fólkum lívið. Trý hús eru skolað burtur. Tríggjar brýr eru horvnar eins og fleiri vegir.
- Frá 1. mai í ár skulu øll ferðandi, sum koma til Hollands vísa pass, og skal hetta galda líka til hálvan desember í ár.
- Í Englandi hava myndugleikarnir handtikið fýra limir í Greenpeace eftir, at hesir høvdu forðað einum kjarnorkuundirvatnsbáti at fara av flotastøðini í Strathclyde í Skotlandi.

FLOGFERÐA SEÐLAR
Faroe Travel
Tlf. 12600

FLOGFRAKT
Faroe Cargo
Tlf. 18787